# ÁRSFRÁSØGN LANDSSJÚRKAHÚSIÐ

2014

# INNIHALDSYVIRLIT


1.0 LEIÐSLUFRÁGREIÐING 3

2.0 NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR 4

3.0 JÁTTANARROKNSKAPURIN 2014 5

3.1 Fíggjarstøðan 31. desember 2014 7

4.0 ÁRSFRÁGREIÐING 2014 8

4.1 Viðmerkingar til artkontubólkaroknskapin 9

4.2 Leiðsluátekning 12

5.0 VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA 13

6.0 ÚTGREINING AV ARTSKONTUBÓLKAROKNSKAPINUM 14

7.0 NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA 18

7.1 Materiell støðisogn 18

7.2.Tænastu-, og vøruskuldarar o.t. 18

7.3. Tøkur peningur 19

7.4. Millumrokning 20

7.5. Útjavningarkonta og millumrokning til samans 20

7.6 Skuld til samans 20

8.0 POSTAR, IÐ IKKI ERU VIÐ Í FÍGGJARSTØÐUNI 21

8.1. Goymslan 21

8.2. Aðrar skyldur 21

9.0 TRYGGINGAR 22

10.0 VIRKSEMI 2014 23

10.1 Starvsfólkayvirlit 2014 24

11.0 BYGNAÐUR LANDSSJÚKRAHÚSIÐ 2014 25

# 1.0 Leiðslufrágreiðing

Síðan ár 2009 hevur Landssjúkrahúsið havt eina yvirordnaða trímannaða leiðslu við sjúkrahússtjóra og 2 varastjórum, ein við læknafakligari bakgrund og ein við sjúkrarøktarfrøðisligari bakgrund. Á Landssjúkrahúsinum eru eisini settar tvímannaðar leiðslur á depilsstøði við leiðandi yvirlækna og leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi. Deplarnir eru: Medisin-, Skurð-, Psykiatri-, Diagnostisk-, Bráð- og Tænastudepil. Sí bygnaðin á síðu 27.

Landssjúkrahúsið arbeiðir eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um Roknskaparverk Landsins o.a.", "Kontuskipan Landsins" og við bókhalds- og roknskaparskipanini "Oracle Financials", sum allar vóru settar í verk í 1997. Bókhalds- og roknskaparskipanin varð endurnýggjað við ársskiftið 2001/2002. Í novembur 2013 byrjaði Landssjúkrahúsið at brúka nýggju Roknskaparverkgongina til at avgreiða fakturar við.

Ein av broytingunum í kunngerðini um roknskaparverk landsins o.a. frá 22. august 1996 er, at ársroknskapirnir fyri almennu stovnarnar eisini skulu fevna um fíggjarstøðu. Hvussu umfatandi hendan fíggjarstøðan skal verða fyri Landssjúkrahúsið, er eitt sindur ógreitt. Fíggjarstøðan er síðani sett upp, so at hendan samsvarar við Búskaparskipan landsins.

Játtanarroknskapurin og fíggjarstøðupostarnir fevna um undirkontu 20, "Vanligt virksemi: Landssjúkrahúsið" og undirkontu 40, "Inntøkufíggjað virksemi: Vaskaríið". Meðan artkontubólkaroknskapurin og artkonturoknskapurin bert umfata vanligt virksemi á Landssjúkrahúsinum.

Umframt vanligu játtanina á fíggjarlógini, so hevur Landssjúkrahúsið, saman við hinum báðum sjúkrahúsunum, eina felags játtan til medicoteknisk tól, sum stendur á egnari høvuðskontu og verður umsitin og útlutað av Heilsumálaráðnum. Í 2011 var serstakur sjúkrahúsheilivágur koyrdur út á eina høvuðskontu fyri seg, sum verður umsitin av eini heilivágsnevnd, og har sjúkrahússtjórin á Landssjúkrahúsinum er formaður. Landssjúkrahúsið hevur seinastu árini arbeitt við at fáa umvælt sjúkrahúsið og hevur í hesum sambandi gjørt eina langtíðarætlan. Til hesa ætlan er ein íløgujáttan til Landssjúkrahúsið, sum verður umsitin av Landsverki og koyrir hendan játtanin tí eisini uttan fyri vanligu rakstrarjáttanina.

## 2.0 Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri 2014 er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár.

**Søla**

Inntøkur frá sølu av vørum og tænastum eru tiknar við í rakstrarroknskapin í tann mun, avhending er farin fram áðrenn árslok. Leiguinntøka verður tó tikin við, tá ið leiguinntøkan er inngoldin – kontantprinsippið.

**Útreiðslur**

Útreiðslur verða rakstrarførdar, tá hesar verða móttiknar og váttaðar sambært váttanarreglunum.

**Materiell støðisogn**

Materiell støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði. Bygningar verða avskrivaðir yvir 50 ár. Avskrivingarnar hava onga ávirkan á raksturin, við tað at talan er um tekniskar avskrivingar.

**Tænastu-, vøruskuldarar o.t.**

Vøru- og tænastuáogn er upptikin til áljóðandi virði hjá Landssjúkrahúsinum og Vaskarínum, hendan er saldan á S/R kontu nr. 0321 í "Summary Trial Balance. Period; 16-13". Avseting verður gjørd móti væntandi tapi upp á skuldarar.

**Goymsla**

Eins og undanfarin ár er virðið á vørugoymsluni ikki tikið við á goymslukontu í fíggjarstøðuni, við tað at játtanarheimild ikki er til tess.

**Ognarar**

Ognarnar innganga í upphæddini "Tøknilig millumrokning við landskassan" konta 0360 og ikki sum ein sjálvstøðugur roknskaparpostur í fíggjarstøðuni.

**Avsettar skyldur**

Avsettar skyldur verða tiknar við í roknskapin, tá ið ein bindandi hending er farin fram, og skyldan er sannlík, men óvist er, nær upphæddin fellur til gjaldingar, ella hvussu stór upphæddin er. Nýtslan av avsettum skyldum verður javnað, tá ið skyldan kann gerast endaliga upp, og skyldan verður útint. Nær skyldan ávirkar úrslitið á játtanarroknskapinum er treytað av eftir hvørjum meginreglum, skyldan er tikin við á fíggjarlóg.

**Salda primo**

Salda primo í fíggjarstøðuni er SR konta nr. 0510 í "Summary Trial Balance. Period; 16-14".

**Millumrokning**

Millumrokning er netto salda av "Summary Trial Balance. Period; 16-14", S/R kontur nr. 0360, 0532, 0814 umframt 0819.

## 3.0 Játtanarroknskapurin 2014

Føroya Løgting samtykti í 2014, at Landssjúkrahúsið skuldi hava eina nettorakstrarjáttan uppá 397.555 tkr., umframt eina eykajáttan uppá 900 tkr. Tilsamans er játtanin frá Føroya Løgtingi til Landssjúkrahúsið 398.455 tkr. fyri 2014. Samansetingin av játtanarroknskapinum er víst í talvuni niðanfyri:

| | | |
|---|---|---|
| Fíggjarlógin 2014 | | 397.555.000 kr. |
| Eykajáttan 2014 | | 900.000 kr. |
| **Til samans** | | **398.455.000 kr.** |
| Útreiðslur | | 442.613.634 kr. |
| Inntøkur | | 40.073.688 kr. |
| **Úrslit 2014** | | **-4.084.946 kr.** |

Landssjúkrahúsið hevði eina meirnýtslu á 4.085 tkr. í 2014, ella eitt nettoúrslit, ið vísir eitt hall á 1%.

Játtanarroknskapurin er okkara uttanhýsis roknskapur og er uppsettur samsvarandi sundurgreiningini á løgtingsfíggjarlógini undir § 11 Heilsumál.

Í tí dagligu stýringini verður hesin roknskapur ikki nýttur. Til hetta endamál hava vit ein innanhýsis Artroknskap, ið er sundurgreinaður í artkontur, ið eru tillagaðar virkseminum í sjúkrahúsverkinum. Frávik millum játtanarroknskap og fíggjarætlan 2014 eru víst á næstu síðu.

# Játtanarroknskapur 2014

| Í kr. | Játtan 2014 | Eykajáttan 2014 | Játtan til samans 2014 | Roknakapur 2014 | Avlop/hall 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Nettoútreiðslujáttan til samans** | **397.555.000** | **900.000** | **398.455.000** | **402.539.946** | **-4.084.946** |
| Útreiðslur til samans | 428.155.000 | 900.000 | 429.055.000 | 442.613.634 | -13.558.634 |
| Inntøkur til samans | -30.600.000 | - | -30.600.000 | -40.073.688 | 9.473.688 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | |
| **Útreiðslur** | **420.655.000** | **900.000** | **421.555.000** | **431.977.867** | **-10.422.867** |
| 11 Lønir | 315.632.000 | 700.000 | 316.332.000 | 311.407.640 | 4.924.360 |
| 14 Keyp av vørum og tænastum | 96.584.000 | 200.000 | 96.784.000 | 113.535.212 | -16.751.212 |
| 15 Keyp av útbúnaði, netto | 6.000.000 | - | 6.000.000 | 4.396.299 | 1.603.701 |
| 16 Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.054.000 | - | 2.054.000 | 1.938.740 | 115.260 |
| 17 Avskrivingar o.a. | - | - | - | 217.932 | -217.932 |
| 19 Ymsar rakstrarútreiðslur | 385.000 | - | 385.000 | 381.980 | 3.020 |
| 25 Eftirlits- og umsjónaravgjøld | - | - | - | - | - |
| 31 Bygging og løguframleiðsla | - | - | - | 44.150 | -44.150 |
| 52 Tilskot til einstaklingar | - | - | - | 595 | -595 |
| 54 Stuðul til annað virksemi | - | - | - | - | - |
| 57 Rentuútreiðslur o.a. | | - | - | -33 | 33 |
| 71 Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar | | - | - | 55.352 | -55.352 |
| **Inntøkur** | **-23.100.000** | **-** | **-23.100.000** | **-28.719.340** | **5.619.340** |
| 21 Søla av vørum og tænastum | -22.000.000 | - | -22.000.000 | -27.316.395 | 5.316.395 |
| 29 Ymsar rakstrarinntøkur | -1.100.000 | - | -1.100.000 | -1.402.945 | 302.945 |
| 31 Bygging og løguframleiðsla | - | - | - | - | - |
| 42 Søla av løgu o.ø. | - | - | - | - | - |
| 63 Vanligar flytiinntøkur | - | - | - | - | - |
| 75 Keyps-mvg | - | - | - | - | - |
| 76 Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar | - | - | - | - | - |
| **Netto úrslit** | **397.555.000** | **900.000** | **398.455.000** | **403.258.527** | **-4.803.527** |
| **40. Inntøkufíggjað virksemi: Vaskaríið** | | | | | |
| **Útreiðslur** | **7.500.000** | **-** | **7.500.000** | **10.635.767** | **-3.135.767** |
| 11 Lønir | 4.200.000 | - | 4.200.000 | 4.972.628 | -772.628 |
| 14 Keyp av vørum og tænastum | 1.800.000 | - | 1.800.000 | 2.799.629 | -999.629 |
| 15 Keyp av útbúnaði, netto | 500.000 | - | 500.000 | - | 500.000 |
| 16 Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.000.000 | - | 1.000.000 | 2.853.062 | -1.853.062 |
| 17 Avskrivingar o.a. | - | - | - | 10.447 | -10.447 |
| 19 Ymsar rakstrarútreiðslur | - | - | - | 1 | -1 |
| 75 Keyps-mvg | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-7.500.000** | **-** | **-7.500.000** | **-11.354.348** | **3.854.348** |
| 21 Søla av vørum og tænastum | -7.500.000 | | -7.500.000 | -11.354.348 | 3.854.348 |
| 29 Ymsar rakstrarinntøkur | - | - | - | - | - |
| **Netto úrslit** | **-** | **-** | **-** | **-718.581** | **718.581** |

## 3.1 Fíggjarstøðan 31. desember 2014

| OGN | nota | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|
| **Støðisogn** | | | |
| Bygningar, løgur o.t. | | 19.382.400 | 19.382.400 |
| Bygningar | | 487.553.245 | 487.553.245 |
| Innbúgv og annar útbúnaður | | 25.473.534 | 25.473.534 |
| Samantaldar avskrivingar - bygningar o.t | | -158.377.412 | -148.248.700 |
| Samantaldar avskrivingar - útbúnaður o.t. | | -8.729.663 | -6.128.853 |
| | | | |
| **Materiell Støðisogn til samans** | 7.1 | **365.302.104** | **378.031.626** |
| | | | |
| **Ogn í umferð** | | | |
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t., landskassadømi | 7.2 | 7.728.599 | 9.766.657 |
| Avsetan móti tapi | | -118.285 | 0 |
| Banka- og girokonti SHD | 7.3 | 187.736 | 455.587 |
| Kontantir kassar | 7.3 | 34.457 | 35.531 |
| Onnur áogn | | 290.065 | 888.558 |
| Tíðaravmarkingar | | 703.546 | 0 |
| | | | |
| **Ogn í umferð til samans** | | **8.826.118** | **11.146.333** |
| | | | |
| **OGN TIL SAMANS** | | **374.128.222** | **389.177.959** |
| | | | |
| **SKYLDUR** | | | |
| **Útjavningarkonta og millumrokning** | | | |
| | | - | - |
| Salda primo | | 5.253.266.375 | 4.864.395.090 |
| Millumrokning | 7.4 | 6.028.186.763 | 5.637.836.025 |
| Úrslit áðrenn játtan | | -402.539.948 | -388.871.285 |
| | | | |
| **Útjanvingarkonta og millumrokning til samans** | 7.5 | **372.380.440** | **384.569.650** |
| | | | |
| **Skuld** | | | |
| Ikki inntøkuført, granskingarinntøkur og gávur | | 0 | 0 |
| Onnur skuld | | 1.747.782 | 4.608.309 |
| | | | |
| **Skuld til samans** | 7.6 | **1.747.782** | **4.608.309** |
| | | | |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | | **374.128.222** | **389.177.959** |

## 4.0 Ársfrágreiðing 2014

Í ársfrágreiðingini viðgera vit fíggjarligar ognir og skuld hjá Landssjúkrahúsinum. Harafturat verða viðmerkingar gjørdar til einstøku kontubólkarnar í rakstrarroknskapinum og til kontubólkarnar í fíggjarstøðuni.

Innanhýsis roknskapurin, "Artkontubólkaroknskapurin", er settur upp í høvuðskontubólkar niðanfyri. Frágreiðing um frávikini í Artkontubólkaroknskapinum er frá síðu 10 til 12.

Artkontubólkaroknskapurin er vístur niðanfyri:

| Art-bólkur | Kontobólkur | Ætlan 2014 | Eykajáttan 2014 | Ætlan +EYÆ 2014 | Roknskapur 2014 | Avlop/hall 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Egnar inntøkur** | | | | | |
| 11 | Inntøkur | -18.440.000 | - | -18.440.000 | -28.794.289 | 10.354.289 |
| 13 | Endurgjøld | - | - | - | -15.287.007 | 15.287.007 |
| | **Egnar inntøkur tilsamans** | **-18.440.000** | **-** | **-18.440.000** | **-44.081.296** | **25.641.296** |
| | **Rakstrarútreiðslur** | | | | | |
| 25 | Lønir | 312.006.351 | 700.000 | 312.706.351 | 326.661.125 | -13.954.774 |
| 31 | Vørur til sjúkraviðgerð og røkt | 40.675.649 | 200.000 | 40.875.649 | 46.200.503 | -5.324.854 |
| 32 | Kostarhald | 4.890.000 | - | 4.890.000 | 7.264.816 | -2.374.816 |
| 34 | Reinhald og vask | 688.000 | - | 688.000 | 677.558 | 10.442 |
| 36 | Skrivstovuhald | 2.985.000 | - | 2.985.000 | 3.422.782 | -437.782 |
| 37 | Bøkur og tíðarrit v.m. | 605.000 | - | 605.000 | 975.479 | -370.479 |
| 38 | Keyp av orku | 11.820.000 | - | 11.820.000 | 9.168.431 | 2.651.569 |
| 41 | Teknisk vørunýtsla | 80.000 | - | 80.000 | 419.749 | -339.749 |
| 42 | Bygningar og grundøki | 1.020.000 | - | 1.020.000 | 747.931 | 272.069 |
| 43 | Tekniskar innlegginar | 2.700.000 | - | 2.700.000 | 3.169.084 | -469.084 |
| 44 | Innbúgv | 1.514.000 | - | 1.514.000 | 2.746.838 | -1.232.838 |
| 45 | Medicoteknikkur | 3.755.000 | - | 3.755.000 | 3.941.043 | -186.043 |
| 46 | Amboð og rakstrargøgn | 1.900.000 | - | 1.900.000 | 1.827.503 | 72.497 |
| 47 | EDV- og skrivstovutól | 5.000.000 | - | 5.000.000 | 7.647.247 | -2.647.247 |
| 51 | Ferða og flutningsútreiðslur | 5.621.000 | - | 5.621.000 | 6.528.648 | -907.648 |
| 52 | Keyp av sakkønari tænastu | 17.590.000 | - | 17.590.000 | 21.814.054 | -4.224.054 |
| 53 | Tryggingar | 520.000 | - | 520.000 | 669.662 | -149.662 |
| 54 | Socialar veitingar | 400.000 | - | 400.000 | 525.568 | -125.568 |
| 61 | Umboðan | 310.000 | - | 310.000 | 423.669 | -113.669 |
| 62 | Aðrar útreiðslur | - | - | - | 255.407 | -255.407 |
| 69 | Skattur og avgjøld | 1.915.000 | - | 1.915.000 | 1.864.932 | 50.068 |
| 00-09 | Ógreinað. | - | - | - | 387.795 | -387.795 |
| | **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **415.995.000** | **900.000** | **416.895.000** | **447.339.824** | **-30.444.824** |
| | **Úrslit áðrenn landskassastuðul** | **397.555.000** | **900.000** | **398.455.000** | **403.258.528** | **-4.803.528** |

Sum sæst omanfyri, vísir artroknskapurin hjá Landssjúkrahúsinum í 2014 eina samlaða nettoútreiðslu uppá 403.259 tkr.

Nettorakstrarútreiðslurnar eru 4.804 tkr. hægri enn játtanin uppá 398.455 tkr. Munurin millum samlaða játtanarroknskapin og artkonturoknskapin er, at Vaskaríið, sum er inntøkufíggjað virksemi, ikki er við í artkonturoknskapinum.

Verður hugt at talvuni niðanfyri sæst, hvussu játtanar- og standardroknskapurin hongur saman við artkonturoknskapinum.

| | Roknskapur 2014 í tkr. |
|---|---|
| Nettoútreiðslur 2014, Landssjúkrahúsið, artskonta | 403.259 |
| Inntøkufíggjað virksemi, Vaskaríið | -719 |
| Landskassastuðul íroknað inntøkufíggjað virksemi | 402.540 |
| Netto minninýtsla | -4.085 |
| Netto játtan til samans, íroknað inntøkufíggjað | 398.455 |

## 4.1 Viðmerkingar til artkontubólkaroknskapin

Niðanfyri eru viðmerkingar til teir kontubólkar, har munandi frávik vóru ímillum ætlan og roknskap. Útgreining av artkontubólkaroknskapinum er at finna frá síðu 15 til 19.

Konta 11 – "Inntøkur" vísir eina meirinntøku uppá 10.354 tkr., sum í høvuðsheitum stavar frá meirinntøku frá sølu úr goymsluni, sølubúðini og húsaleiðu. Umframt lønarendurgjald vegna Trygd & Dygd og Trýsttangan, hetta er tó útreiðsluneutralt. Viðvíkjandi meirsølu hjá sølubúðini verður inntøkurnar javnaðar við tær lønarútreiðslur sum Landssjúkrahúsið hevur av sølubúðini.

Konta 13 – "Endurgjøld" vísir eina meirinntøku á 15.287 tkr. Í 2014 eru 15.287 tkr. endurgoldnar. Hetta er endurgjald frá lønarkoyring fyri onnur og endurgjald frá barnsburðargrunninum, sum er útreiðsluført á artkontubólki 25, Lønir.

Konta 25 – "Lønir til samans" vísa eina meirnýtslu uppá 13.955 tkr. í artroknskapinum. Men tá hædd verður tikin fyri "Endurgjaldi" fyri lønir á 15.287 tkr. undir bólki 13, er talan um eina minninýtslu uppá 1.332 tkr. Minninýtslan stavar frá nógvum sparingum, eins og at deildir hava verið stongdar ávís tíðarskeið. Í ávísum førum hevur ikki verið møguleiki at fáa serlæknar í fast starv á Landssjúkrahúsinum, og hava vit tí verið noydd at keypa tænastuna frá øðrum sjúkrahúsum og serlæknum annars, tí hevur hetta viðført meirútreiðslur á rakstrarkontum fyri konsulentar.

Konta 31 – "Vørur til sjúkraviðgerð og røkt" eru 5.325 tkr. meiri enn mett. Hendan meirútreiðslan stavar serstakliga frá, at m.a. heilivágurin er dýrari enn mett og útreiðslur til vørur til viðgerð og røkt m.a. innan rannsóknarstovuøkið eru dýrkaðar munandi.

Konta 32 – "Kostarhald" hevði eina meirnýtslu uppá 2.375 tkr., ið stendst lutvíst av príshækkingum og øktum útreiðslum til kostískoyti til sjúklingaviðgerð.

Konta 34 – "Reinhald og vask" hevði eina minninýtslu uppá 10 tkr.

Konta 36 – "Skrivstovuhald" hevði eina meirnýtslu uppá 438 tkr., og stavar hendan í høvuðsheitinum frá príshækkingum og nútímansgerð av skrivstovutólum o.a.

Konta 37 – "Bøkur og tíðarrit v.m." vísir eina meirnýtslu uppá 370 tkr. Fyrisitingin hevur í 2014 keypt fleiri undirvísingarbøkur inn, og sølubúðin hevur keypt avísir og onnur tíðarrit, sum vísa seg sum inntøkur undir artbólki 21.

Konta 38 – "Keyp av orku" hevði eina minninýtslu uppá 2.652 tkr. Her er tað serstakliga oljuprísurin, ið hevur verið lækkandi, umframt at oljan hevur verið boðin út í 2014.

Konta 41 – "Teknisk vørunýtsla" hevði eina meirnýtslu uppá 340 tkr. Meirnýtstlan stavar frá at Landssjúkrahúsið hevur talgilda Dect-telefonnetið.

Konta 42 – "Bygningar og grundøki" hevði eina minninýtslu í mun til ætlanina uppá 272 tkr.

Konta 43 - "Tekniskar innleggingar" hevði eina meirnýtslu uppá 469 tkr. Hetta av m.a. nútímansgerð av íbúðarblokkunum og endurnýggjan av netverk innan kt og telefoni.

Konta 44 – "Innbúgv" hevði eina meirnýtslu uppá 1.233 tkr. Her hava ávís eyka innkeyp verið í smb. við viðlíkahald av blokkinum og á P40 umframt keyp av nýggjari OP-legu.

Konta 45 – "Medicoteknisk tól" hevði eina meirnýtslu uppá 186 tkr.

Konta 46 – "Amboð og rakstrargøgn" vísir eina minninýtslu uppá 72 tkr.

Konta 47 – "EDV- og skrivstovutól" vísir eina meirnýtslu uppá 2.647 tkr. Hetta kemst av, at nógv orka verður brúkt uppá at gera Landssjúkrahúsið pappírleyst. Umframt endurnýggjan av kt-infrakervið.

Konta 51 – "Ferða- og flutningsútreiðslur" hevði eina meirnýtslu uppá 908 tkr. Stavar m.a. frá eykaútreiðslum av læknakonsulentum.

Rættað! Konta 52 – "Keyp av sakkønari tænastu" hevði eina meirnýtslu uppá 4.224 tkr. Hetta kemst serstakliga av skeivnum skrásetingum innan rannsóknarstovuna viðv keyp av uttanhýsis kanningum. Tó stavar eisini nakað av meirnýstluni frá keyp av konsulentum á barna- og ungdómsspykiatri og á medisinska økinum.

Konta 53 – "Tryggingar" hevði eina meirnýtslu uppá 150 tkr.

Konta 54 – "Sosialar veitingar" hevði eina meirnýtslu uppá 126 tkr.

Konta 61 – "Umboðan". Hendan útreiðslukonta hevði eina meirnýtslu upp á 114 tkr.

Konta 62 – "Aðrar útreiðslur" hevði eina meirnýtslu uppá 255 tkr.

Konta 69 – "Skattur og avgjøld" hevði eina minninýtslu uppá 50 tkr.

Konta 00 – "Opnir postar" hevði eina upphædd uppá 388 tkr.

## 4.2 Leiðsluátekning

Ársroknskapurin hjá Landssjúkrahúsinum er eftir okkara meting greiddur úr hondum samsvarandi galdandi roknskaparreglum. Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi. Ógreitt er, hvussu skyldugar starvsfólkaskyldur skulu viðgerast roknskaparliga sambært "Kunngerð nr. 22. frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Mettu starvsfólkaskyldurnar eru gjørdar upp til 22 mió.kr., sum eru vístar í notu 8.2 í roknskapinum.

Síðan roknskaparárslok er einki hent, sum í týðandi mun hevur ávirkan á ársfrásøgnina.

Tórshavn hin 22.10.2015

Johnny í Grótinum
Virkandi Sjúkrahússtjóri

Ársfrásøgnin er framløgd og góðkend av leiðsluni á Landssjúkrahúsinum

hin 22.10.2015

| | |
|---|---|
| Johnny í Grótinum | Naina Túgvustein |
| Sjúkrahússtjóri | Varastjóri |

# 5.0 Váttan frá óheftum grannskoðara

**Til løgtingsgrannskoðararnar**

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Landssjúkrahúsinum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2013 við nýttum roknskaparhátti, játtanarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Ætlanartølini eeru ikki fevnd av okkara grannskoðan.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, herundir "Løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.". Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at stovnurin kann gera ein ársroknskap, sum er rættur, tað vil siga uttan týðandi skeivleikar. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin fyri 2013 gevur eina rættvísandi mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

## Ískoytisupplýsingar um viðurskifti í roknskapinum

Uttan at taka fyrivarni verður víst til leiðsluátekningina, har leiðslan ger vart við, at tað er ógreitt, hvussu skyldugar starvsfólkaskyldur skulu viðgerast roknskaparliga sambært "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Tórshavn, hin 22.10.2015

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
*statsaut. revisor*

# 6.0 Útgreining av artskontubólkaroknskapinum

| Kontonr. | Kotnunavn | Ætlan 2014 | Eykaætlan | Roknskapur 2014 | Avlop/hall 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **11. Inntøkur** | | | | |
| 1105 | Søla av vørum | -13.840.000 | 0 | -19.046.310 | 5.206.310 |
| 1110 | Søla av tænastum | -1.200.000 | 0 | -3.819.201 | 2.619.201 |
| 1120 | Leiga av húsum, íbúðum og verilsum | -3.200.000 | 0 | -3.624.712 | 424.712 |
| 1125 | Leiga av hølum og økjum | 0 | 0 | -962.125 | 962.125 |
| 1130 | Telefoninntøkur | 0 | 0 | -268 | 268 |
| 1135 | Ljósprent, postgjøld v.m. | 0 | 0 | -454 | 454 |
| 1140 | Aðrar inntøkur | -200.000 | 0 | -1.341.219 | 1.141.219 |
| | **Inntøkur til samans** | **-18.440.000** | **0** | **-28.794.289** | **10.354.289** |
| | 13. Endurgjøld | | | | |
| 1300 | Endurgjøld | 0 | 0 | -833.174 | 833.174 |
| 1305 | EndurgjAld lønir | 0 | 0 | -14.453.833 | 14.453.833 |
| | **Endurgjøld til samans** | **0** | **0** | **-15.287.007** | **15.287.007** |
| | **25. Lønir** | | | | |
| 2505 | Grundløn | 312.006.351 | 700.000 | 208.919.200 | 103.787.151 |
| 2510 | Funktiónsviðbøtur | 0 | 0 | 8.085.499 | -8.085.499 |
| 2515 | Avspákingarbarar viðbøtur | 0 | 0 | 1.591.996 | -1.591.996 |
| 2520 | Ikki avspákingarbarar viðbøtur | 0 | 0 | 17.837.288 | -17.837.288 |
| 2525 | Samsýning | 0 | 0 | 9.644.371 | -9.644.371 |
| 2530 | Vanligir tímar | 0 | 0 | 18.909.320 | -18.909.320 |
| 2535 | Yvirtímar | 0 | 0 | 8.338.857 | -8.338.857 |
| 2540 | Frítíðarløn & -ískoyti | 0 | 0 | 12.581.841 | -12.581.841 |
| 2545 | Sjúkrahúsins partur til eftirlønir & tryggingar | 0 | 0 | 30.029.710 | -30.029.710 |
| 2550 | Arbeiðsmarknaðargjøld | 0 | 0 | 10.723.044 | -10.723.044 |
| | **Lønir til samans** | **312.006.351** | **700.000** | **326.661.126** | **-13.954.775** |
| | **31. Vørur til sjúkraviðgerð og røkt** | | | | |
| 3100 | Vørur til sjúkraviðgerð og røkt | 0 | 0 | 38.649 | -38.649 |
| 3101 | Kostnaður fyri seldar vørur | 0 | 0 | 64.654 | -64.654 |
| 3105 | Vanligar nýtsluvørur | 20.950.649 | 200.000 | 22.579.445 | -1.428.796 |
| 3110 | Servørur | 8.075.000 | 0 | 9.760.311 | -1.685.311 |
| 3115 | Útlánsvørur | 0 | 0 | 500 | -500 |
| 3120 | Instrumentir | 250.000 | 0 | 260.151 | -10.151 |
| 3125 | Heilivágur | 11.400.000 | 0 | 13.710.610 | -2.310.610 |
| 3199 | Annað | 0 | 0 | -213.817 | 213.817 |
| | **Vørur til sjúkraviðgerð og røkt til samans** | **40.675.649** | **200.000** | **46.200.503** | **-5.324.854** |
| | **32. Kostarhald** | | | | |
| 3200 | Kostarhald | 0 | 0 | 18.025 | -18.025 |
| 3205 | Kolonial | 1.700.000 | 0 | 2.714.346 | -1.014.346 |
| 3210 | Kjøtvørur | 600.000 | 0 | 768.554 | -168.554 |
| 3215 | Fiskavørur | 200.000 | 0 | 275.629 | -75.629 |
| 3220 | Sodavatn, juice og bjór v.m. | 120.000 | 0 | 242.166 | -122.166 |
| 3225 | Mjólkaúrdráttir | 600.000 | 0 | 649.173 | -49.173 |
| 3230 | Breyð, køkur v.m. | 250.000 | 0 | 745.394 | -495.394 |
| 3231 | Góðgæti | 0 | 0 | 390.763 | -390.763 |
| 3235 | Kaffi, te. | 0 | 0 | 6.081 | -6.081 |
| 3240 | Eplir og grønmeti | 200.000 | 0 | 252.657 | -52.657 |
| 3241 | Frukt | 200.000 | 0 | 118.534 | 81.466 |
| 3242 | Frukt starvsfólk | 120.000 | 0 | 248.048 | -128.048 |
| 3245 | Sondikostur | 900.000 | 0 | 1.599.957 | -699.957 |
| 3250 | Annað | 0 | 0 | -716.826 | 716.826 |
| 3260 | Avsláttur | 0 | 0 | -47.686 | 47.686 |
| | **Kostarhald til samans** | **4.890.000** | **0** | **7.264.815** | **-2.374.815** |

| Kontonr. | Kotnunavn | Ætlan 2014 | Eykaætlan | Roknskapur 2014 | Avlop/hall 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| | 34. Reinhald og vask | | | | |
| 3400 | Reinhald og vask | 0 | 0 | 888 | -888 |
| 3405 | Reingerð- og vaskievni | 160.000 | 0 | 169.131 | -9.131 |
| 3415 | Bustir, klútar v.m. | 84.000 | 0 | 75.199 | 8.801 |
| 3430 | Annað reinhald v.m. | 444.000 | 0 | 410.258 | 33.742 |
| 3435 | Persónligt reinhald | 0 | 0 | 22.081 | -22.081 |
| | **Reinhald og vask til samans** | **688.000** | **0** | **677.557** | **10.443** |
| | 36. Skrivstovuhald | | | | |
| 3600 | Skrivstovuhald | 0 | 0 | 48.352 | -48.352 |
| 3605 | Pappír og prentlutir | 170.000 | 0 | 316.554 | -146.554 |
| 3610 | Vanligir skrivstovulutir | 500.000 | 0 | 507.244 | -7.244 |
| 3615 | Lýsingar | 210.000 | 0 | 182.441 | 27.559 |
| 3620 | Telefon v.m. | 1.405.000 | 0 | 1.684.278 | -279.278 |
| 3621 | Internetnýtsla | 200.000 | 0 | 93.566 | 106.434 |
| 3625 | Postgjald v.m. | 500.000 | 0 | 590.347 | -90.347 |
| | **Skrivstovuhald til samans** | **2.985.000** | **0** | **3.422.782** | **-437.782** |
| | 37. Bøkur og tíðarrit v.m. | | | | |
| 3705 | Tíðarrit og annað blaðhald | 600.000 | 0 | 857.040 | -257.040 |
| 3710 | Bøkur og bóklingar | 5.000 | 0 | 83.076 | -78.076 |
| 3715 | Undirvísingartilfar | 0 | 0 | 35.362 | -35.362 |
| | **Bøkur og tíðarrit v.m. til samans** | **605.000** | **0** | **975.478** | **-370.478** |
| | 38. Keyp av orku | | | | |
| 3805 | El | 5.010.000 | 0 | 5.066.062 | -56.062 |
| 3810 | Olja | 6.670.000 | 0 | 4.085.475 | 2.584.525 |
| 3815 | Bensin | 140.000 | 0 | 13.186 | 126.814 |
| 3820 | Annað | 0 | 0 | 3.709 | -3.709 |
| | **Keyp av orku til samans** | **11.820.000** | **0** | **9.168.432** | **2.651.568** |
| | 41. Teknisk vørunýtsla | | | | |
| 4100 | Teknisk vørunýtsla | 0 | 0 | 62.824 | -62.824 |
| 4105 | Byggitilfar v.m. | 30.000 | 0 | 86.853 | -56.853 |
| 4110 | Tekniskir lutir v.m. | 50.000 | 0 | 270.071 | -220.071 |
| | **Teknisk vørunýtsla til samans** | **80.000** | **0** | **419.748** | **-339.748** |
| | 42. Bygningar og grundøki | | | | |
| 4205 | Málaraarbeiði | 300.000 | 0 | 235.159 | 64.841 |
| 4210 | Takarbeiði | 10.000 | 0 | 0 | 10.000 |
| 4215 | Timbur og múraraarbeiði | 0 | 0 | 3.399 | -3.399 |
| 4216 | Snikkaraarbeiði | 10.000 | 0 | 6.309 | 3.691 |
| 4217 | Múraraarbeiði | 100.000 | 0 | 85.330 | 14.670 |
| 4220 | Jørðarbeiði | 150.000 | 0 | 40.132 | 109.868 |
| 4221 | Timburarbeiði | 50.000 | 0 | 16.338 | 33.662 |
| 4225 | Vindeygu og hurðar | 300.000 | 0 | 159.650 | 140.350 |
| 4230 | Leiga | 100.000 | 0 | 201.613 | -101.613 |
| | **Bygningar og grundøki til samans** | **1.020.000** | **0** | **747.930** | **272.070** |

| Kontonr. | Kotnunavn | Ætlan 2014 | Eykaætlan | Roknskapur 2014 | Avlop/hall 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **43. Tekniskar innleggingar** | | | | |
| 4300 | Tekniskar innleggingar | 0 | 0 | 75.162 | -75.162 |
| 4305 | Hitaverk | 80.000 | 0 | 56.698 | 23.302 |
| 4310 | Dampverk | 50.000 | 0 | 187.155 | -137.155 |
| 4315 | El-skipan | 350.000 | 0 | 619.942 | -269.942 |
| 4320 | Eldávaring og sløkkiamboð | 150.000 | 0 | 208.878 | -58.878 |
| 4325 | Telesamskifti og samtaluskipan | 20.000 | 0 | 163.641 | -143.641 |
| 4330 | Frysti og køliskipan | 150.000 | 0 | 330.798 | -180.798 |
| 4335 | Kloakskipan | 100.000 | 0 | 36.866 | 63.134 |
| 4340 | CTS-skipan | 100.000 | 0 | 96.700 | 3.300 |
| 4345 | Súrevni og medicinskluft | 850.000 | 0 | 1.042.152 | -192.152 |
| 4350 | H & VS | 200.000 | 0 | 129.973 | 70.027 |
| 4355 | Liftir | 600.000 | 0 | 220.160 | 379.840 |
| 4360 | Ventiliatión | 50.000 | 0 | 958 | 49.042 |
| | **Tekniskar innleggingar tilsamans** | **2.700.000** | **0** | **3.169.083** | **-469.083** |
| | **44. Innbúgv** | | | | |
| 4400 | Innbúgv | 0 | 0 | 65.695 | -65.695 |
| 4405 | Sengur, legur og borð v.m. | 100.000 | 0 | 1.055.536 | -955.536 |
| 4410 | Seingarklæðir, búnar, toy v.m. | 634.000 | 0 | 757.569 | -123.569 |
| 4415 | Skrivaraborð, hyllar og stólar | 10.000 | 0 | 40.945 | -30.945 |
| 4420 | Hvítvørur | 130.000 | 0 | 327.115 | -197.115 |
| 4425 | Búnýti | 40.000 | 0 | 60.283 | -20.283 |
| 4430 | Radio, sjónvarp og video | 150.000 | 0 | 147.622 | 2.378 |
| 4435 | Annað innbúgv | 450.000 | 0 | 292.073 | 157.927 |
| | **Innbúgv til samans** | **1.514.000** | **0** | **2.746.838** | **-1.232.838** |
| | **45. Medicoteknikkur** | | | | |
| 4505 | Kanningartól | 2.430.000 | 0 | 2.538.854 | -108.854 |
| 4510 | Viðgerðartól | 1.075.000 | 0 | 1.020.442 | 54.558 |
| 4520 | Rannsóknartól | 250.000 | 0 | 309.860 | -59.860 |
| 4525 | Onnur medicoteknisk tól | 0 | 0 | 71.888 | -71.888 |
| | **Medicoteknikkur til samans** | **3.755.000** | **0** | **3.941.044** | **-186.044** |
| | **46. Amboð og rakstrargøgn** | | | | |
| 4605 | Størri maskinur | 300.000 | 0 | 451.071 | -151.071 |
| 4610 | Bilar og onnur flutningstól | 1.155.000 | 0 | 876.927 | 278.073 |
| 4615 | Autoclavur | 300.000 | 0 | 378.975 | -78.975 |
| 4620 | Hjálpitól | 0 | 0 | 88.945 | -88.945 |
| 4625 | Smáamboð | 45.000 | 0 | 74.376 | -29.376 |
| 4630 | Onnur amboð og maskinur | 100.000 | 0 | -42.790 | 142.790 |
| | **Amboð og rakstrargøgn til samans** | **1.900.000** | **0** | **1.827.504** | **72.496** |
| | **47. EDV- og skrivstovutól** | | | | |
| 4700 | EDV- og skrivstovutól | 0 | 0 | 3.382 | -3.382 |
| 4705 | Software | 3.100.000 | 0 | 2.803.628 | 296.372 |
| 4710 | Hardware | 480.000 | 0 | 2.286.631 | -1.806.631 |
| 4715 | Prentarar | 50.000 | 0 | 182.076 | -132.076 |
| 4720 | Skrivstovuútbúnaður | 170.000 | 0 | 59.378 | 110.622 |
| 4725 | Telefonir og diktafonir | 220.000 | 0 | 529.382 | -309.382 |
| 4730 | Netskipan | 680.000 | 0 | 1.183.574 | -503.574 |
| 4735 | Edv-útgerð | 200.000 | 0 | 395.171 | -195.171 |
| 4740 | Leiga | 100.000 | 0 | 204.024 | -104.024 |
| | **EDV- og skrivstovutól til samans** | **5.000.000** | **0** | **7.647.246** | **-2.647.246** |

| Kontonr. | Kotnunavn | Ætlan 2014 | Eykaætlan | Roknskapur 2014 | Avlop/hall 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **51. Ferða- og flutningsútreiðslur** | | | | |
| 5100 | Ferða og flutningsútreiðslur | 0 | 0 | 5.058 | -5.058 |
| 5105 | Tíma- og dagpeningur | 107.000 | 0 | 211.446 | -104.446 |
| 5110 | Náttarviðbøtur | 26.000 | 0 | 14.214 | 11.786 |
| 5115 | Vistarhald | 229.000 | 0 | 508.737 | -279.737 |
| 5120 | Akfør | 918.000 | 0 | 990.298 | -72.298 |
| 5125 | Koyripeningur | 233.000 | 0 | 602.309 | -369.309 |
| 5130 | Loftvegis | 1.677.000 | 0 | 2.078.867 | -401.867 |
| 5135 | Sjóvegis | 600.000 | 0 | 652.783 | -52.783 |
| 5140 | Skeiðsgjald | 1.581.000 | 0 | 1.249.057 | 331.943 |
| 5145 | Flytiendurgjald | 250.000 | 0 | 195.865 | 54.135 |
| 5150 | Ferðaforskot | 0 | 0 | 20.015 | -20.015 |
| | **Ferða og flutningsútreiðslur til samans** | **5.621.000** | **0** | **6.528.649** | **-907.649** |
| | **52. Keyp av sakkønari tænastu** | | | | |
| 5200 | Keyp av sakkønari tænastu | 0 | 0 | 1.000 | -1.000 |
| 5206 | Abonnementsgjald serviðgerð | 0 | 0 | 4.400 | -4.400 |
| 5210 | Uttanhýsis kanningar, aðrar | 6.950.000 | 0 | 8.981.634 | -2.031.634 |
| 5215 | Uttanhýsis kanningar og viðgerðir sjúklingar | 0 | 0 | 388 | -388 |
| 5220 | Konsulenttænasta | 7.190.000 | 0 | 5.514.113 | 1.675.887 |
| 5225 | Grannskoðan v.m. | 250.000 | 0 | 290.568 | -40.568 |
| 5230 | Edv | 0 | 0 | 23.952 | -23.952 |
| 5235 | Arkitektar og verkfrøðingar | 30.000 | 0 | 1.643 | 28.357 |
| 5240 | Aðrar tænastur | 3.170.000 | 0 | 6.996.356 | -3.826.356 |
| | **Keyp av sakkønari tænastu til samans** | **17.590.000** | **0** | **21.814.054** | **-4.224.054** |
| | **53. Tryggingar** | | | | |
| 5305 | Ferðatryggingar | 70.000 | 0 | 17.012 | 52.988 |
| 5315 | Akfars trygging | 90.000 | 0 | 67.024 | 22.976 |
| 5320 | Húsatrygging | 350.000 | 0 | 447.361 | -97.361 |
| 5325 | Ábyrgdartrygging | 0 | 0 | 73.969 | -73.969 |
| 5330 | Vanlukkutrygging | 10.000 | 0 | 20.146 | -10.146 |
| 5350 | Tryggingarendurgjald | 0 | 0 | 44.150 | -44.150 |
| | **Tryggingar til samans** | **520.000** | **0** | **669.662** | **-149.662** |
| | **54. Sosialar veitingar** | | | | |
| 5410 | Hárfríðkan | 300.000 | 0 | 257.577 | 42.423 |
| 5415 | Klæðir og fótbúni v.m. | 0 | 0 | 190.025 | -190.025 |
| 5420 | Tannlækni og brillur | 0 | 0 | 36.977 | -36.977 |
| 5425 | Ítrivstilfar | 30.000 | 0 | 35.923 | -5.923 |
| 5435 | Aðrar sosialar veitingar | 70.000 | 0 | 5.066 | 64.934 |
| | **Sosialar veitingar til samans** | **400.000** | **0** | **525.568** | **-125.568** |
| | **61. Umboðan** | | | | |
| 6100 | Umboðan | 0 | 0 | 6.098 | -6.098 |
| 6105 | Gávur og blómur | 210.000 | 0 | 334.163 | -124.163 |
| 6110 | Matstovurokningar v.m. | 100.000 | 0 | 83.408 | 16.592 |
| | **Umboðan til samans** | **310.000** | **0** | **423.669** | **-113.669** |
| | **62. Aðarar útreiðslur** | | | | |
| 6205 | Kassamunur | 0 | 0 | 37.300 | -37.300 |
| 6215 | Rentuútreiðslur | 0 | 0 | 4.203 | -4.203 |
| 6220 | Bankakostnaður | 0 | 0 | -4.029 | 4.029 |
| 6225 | Avskrivingar | 0 | 0 | 217.932 | -217.932 |
| | **Aðrar útreiðslur til samans** | **0** | **0** | **255.406** | **-255.406** |
| | **69. Skattur og Avgjøld** | | | | |
| 6915 | Tollur | 150.000 | 0 | 204.466 | -54.466 |
| 6920 | Flutnings og farmagjald | 1.750.000 | 0 | 1.647.737 | 102.263 |
| 6925 | Vegskattur | 15.000 | 0 | 12.729 | 2.271 |
| | **Skattur og Avgjøld til smans** | **1.915.000** | **0** | **1.864.932** | **50.068** |
| | **Opnir postar** | | | | |
| 0 | Ógreinað. | 0 | 0 | 387.795 | -387.795 |
| | **Opnir postar til samans** | **0** | **0** | **387.795** | **-387.795** |

# 7.0 Notur til fíggjarstøðuna

## 7.1 Materiell støðisogn

Materiella støðisognin á fíggjarstøðuni umfatar konturnar 0100-0149, og er roknskaparliga virðið útgreinað á hendan hátt:

| | Grundøki og Bygningar | | Innbúgv og annar útbúnaður | | Til samans | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | kr. | 506.935.645,00 | kr. | 25.473.534,00 | kr. | 532.409.179,00 |
| Tilgongd | kr. | - | kr. | - | kr. | - |
| Útveganarvirði ultimo | kr. | 506.935.645,00 | kr. | 25.473.534,00 | kr. | 532.409.179,00 |
| | | | | | | |
| Avskrivingar primo | kr. | -148.248.699,52 | kr. | -6.128.853,09 | kr. | -154.377.552,61 |
| Avskrivingar í árinum | kr. | -10.128.712,90 | kr. | -2.600.809,48 | kr. | -12.729.522,38 |
| Avskrivingar ultimo | kr. | -158.377.412,42 | kr. | -8.729.662,57 | kr. | -167.107.074,99 |
| | | | | | | |
| **Roknskaparligt virði** | **kr.** | **348.558.232,58** | **kr.** | **16.743.871,43** | **kr.** | **365.302.104,01** |

Landssjúkrahúsið hevur eisini rakstrartól og annað leysafæ, ið ikki er bókað á fíggjarstøðuni. Tilgongd er ikki skrásett í skipanini síðani 2012.

**Leysafæ og rakstrartól, ið ikki eru bókaði í fíggjarstøðuni:**

| | Útveganarvirði primo | |
|---|---|---|
| Leysafæ og rakstrartól, sum hevur upprunavirið undir 75.000 | kr. | 28.932.222,12 |
| Leysafæ og rakstrartól, ið veðrur mett liðgut avskrivað | kr. | 65.166.309,35 |
| Tilgongd í 2012 til 2014, ið manglar at skrásetast | kr. | 10.469.559,00 |
| **Til samans** | **kr.** | **104.568.090,47** |

## 7.2.Tænastu-, og vøruskuldarar o.t.

Tað, ið Landssjúkrahúsið selur til uttanhýsis kundar, verður skrásett í "Oracle Debitor" skipanini og bókað á Standardroknskaparkontu 0321. Samlaðu debitorarnir 31. desember 2014 vóru 7.731 tkr., harav 680 tkr. vóru eldri enn 2 mánaðir. Í 2013 vóru samlaðu debitorarnir 9.767 tkr., harav 559 tkr. vóru eldri enn 2 mánaðir.

Debitorar kunnu sundurgreinast soleiðis:

| **Stovnsheiti** | **Stovnsnummar** | | **Upphædd tkr.** | **Yvir 2 mðr.** |
|---|---|---|---|---|
| Landssjúkrahúsið | 121220 | | 7.124 | 629 |
| Vaskaríið | 138418 | | 607 | 51 |
| **Til samans** | | | **7.731** | **680** |

### 7.3. Tøkur peningur

Tøkur peningur hjá Landssjúkrahúsinum er bæði á kontu í peningastovnum umframt kontantur kassapeningur. 4 peningastovnskontur eru ikki við í fíggjarstøðuni. Talan er um kontur, ið ikki hava nakað við raksturin á Landssjúkrahúsinum at gera.

Landssjúkrahúsið hevði pr. 31. desember 2014 hesar upphæddir innistandandi á hesum kontum.

| | | |
|---|---|---|
| 6460-153.934.7 | Kassakredittur | kr. 102.022,81 |
| 6460-157.684.6 | Húsaleiga | kr. 71.855,14 |
| 9181-123.713.8 | Sølubúð | kr. 8.953,97 |
| 9181-495.004.8 | Køkurin | kr. 4.391,91 |
| 9181-144.693.4 | Vekslarin | kr. 179,30 |
| 6460-183.475.6 | Skeiðskonta | kr. 332,80 |
| 6460-162.745.9 | Sjúklingaskrivstovan | kr. - |
| **Peningastovnar** | **Til samans** | **kr. 187.735,93** |
| Opnir postar | Til samans | kr. - |
| **Peningastovnar og bankakonti** | **Til samans** | **kr. 187.735,93** |
| **Kontantir kassar** | **Til samans** | **kr. 34.457,00** |
| **Onnur banka konti** | | |
| 6460-169.972.7 | Listagrun Landsjúkrahúsins | kr. 25.286,05 |
| 9181-442.134.7 | Hvonnin | kr. 92.430,69 |
| 9181-150.450.0 | Diabetis ambulatoriið | kr. 190,00 |
| 6460-122.165.7 | Mastercard- varastjórið | kr. - |
| 6460-122.163.0 | Mastercard- fyristingarleiðari | kr. -3.299,15 |
| **Onnur banka konti** | **Til samans** | **kr. 114.607,59** |
| Peningur | **Til samans** | **kr. 336.800,52** |

## 7.4. Millumrokning

Millumrokning er tøkniligar millumrokningarkontur í millum Gjaldstovuna og Landssjúkrahúsið.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 0360 | Tøknilig millumrokning (balancing segment) | kr. | -5.662.630.316 |
| 0532 | Mótkonta til StRk 01 materiellur og imm. útb. | kr. | -365.302.104 |
| 0646 | Millumrokning við FSL-debitor | kr. | 1.200 |
| 0819 | Skuld, sum er greidd til útgjaldingar, ymsar skipanir | kr. | -255.543 |
| | **Millumrokning í alt** | **kr.** | **-6.028.186.763** |

## 7.5. Útjavningarkonta og millumrokning til samans

Útjavningarkonta og millumrokning til samans á Landssjúkrahúsinum framkemur soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 0510 | 0510 Salda pimo | kr. | -5.253.266.375 |
| | Millumrokning, sí notu 7.4 | kr. | 6.028.186.763 |
| | Úrslit áðrenn játtan | kr. | -402.539.948 |
| | **Útjanvingarkonta og millumrokning til samans** | **kr.** | **372.380.440** |

## 7.6 Skuld til samans

Onnur skuld eru hjálparkontur, sum ikki eru clearaði í null 31. desember 2014.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 0831 | Inngangandi mvg-rakstur (keyps-mvg-rakstur) | kr. | 20.767 |
| 0833 | Útgangandi mvg (sølu-mvg) | kr. | -40.948 |
| 0888 | Skuld, annað | kr. | -1.727.601 |
| | **Mvg o.a. í alt** | **kr.** | **-1.747.782** |

Saldan á kontu 0888 "Skuld, annað" er m.a. starvsfólkaskyldur og periodisering av barsilsendurgjald.

# 8.0 Postar, ið ikki eru við í fíggjarstøðuni

## 8.1. Goymslan

Landssjúkrahúsið hevur eina felagsgoymslu, sum serliga stovnarnir undir Heilsumálaráðnum keypa frá. Goymslan er ikki í fíggjarstøðuni, við tað at keypið verður útreiðsluført við innkeyp í rakstrinum.

Goymsluvirðið av nýtsluvørum, ið varð uppgjørt til kostvirði, var 6.392 tkr. tann 31. desember 2014 í mun til 5.801 tkr. 31. desember 2013.

## 8.2. Aðrar skyldur

Aðrar skyldur hjá Landssjúkrahúsinum, sum ikki eru við í fíggjarstøðuni, kunnu gerast upp á henda hátt.

| | Mett virði | Tímar/dag | Upphædd |
|---|---|---|---|
| Tímar til avspákan | 175 | 33.779 | 5.911.399 |
| Feriutímar | 175 | 16.934 | 2.963.450 |
| Serstøk frívika | 200 | 22.409 | 4.481.800 |
| Erstatningsfrídagar – yvirlæknar | 501 | 17.368 | 8.701.368 |
| Mett grannskoðan 2014 | | | 250.000 |
| | | | **22.308.017** |

## 9.0 Tryggingar

Á Landssjúkrahúsinum vóru hesar tryggingar galdandi ultimo 2014.

| Trygging | Tryggingarlutur | Tr.skjal | Árligt gjald | |
|---|---|---|---|---|
| **Bygningar** | | | | |
| Sethús | Grønalíð 3 | 673196 | kr. | 3.635 |
| Sethús | Háskúlavegur 5 | 673560 | kr. | 3.563 |
| Sethús | Grønlandsvegur 63 | 673234 | kr. | 5.132 |
| Sethús | Bóndabrekka 13 | 673390 | kr. | 3.563 |
| Sethús | Íslandsvegur 15 | 637471 | kr. | 3.076 |
| Vinnubygningur | Sjúkrahúsbygningar | 22400509 | kr. | 485.840 |
| **Bygningar til samans** | | | **kr.** | **504.809** |
| **Ábyrgd** | | | | |
| Vinnuábyrgd | Sjúkrahús | 22613294 | kr. | 55.000 |
| **Ábyrgd til samans** | | | **kr.** | **55.000** |
| **Vanlukka** | | | | |
| Felags vanlukkutrygging | Trýstkamar | 1493973 | kr. | 37.500 |
| **Vanlukka til samans** | | | **kr.** | **37.500** |
| **Ferðatrygging** | | | | |
| Vinnuferðatrygging | ferðatrygging | 008 250 436 | kr. | 44.484 |
| **Ferðatrygging til samans** | | | **kr.** | **44.484** |
| **Akfør** | | | | |
| Biltrygging | LS779 | 776289 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS126 | 1430890 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS189 | 1457225 | kr. | 468 |
| Biltrygging | LS572 | 1843591 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS111 | 1843745 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS444 | 10565170 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | KN821 | 10991951 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS225 | 12357583 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS421 | 12853572 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS459 | 22218409 | kr. | 359 |
| Biltrygging | LS338 | 23232456 | kr. | 4.404 |
| Biltrygging | LS806 | 30446909 | kr. | 3.563 |
| Biltrygging | LS003 | 30448529 | kr. | 4.404 |
| Biltrygging | LS583 | 30555341 | kr. | 4.404 |
| Biltrygging | BN424 | 30688465 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS921 | 30692357 | kr. | 3.984 |
| Biltrygging | NJ917 | 30692462 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS899 | 30770404 | kr. | 2.279 |
| Biltrygging | LS862 | 31070988 | kr. | 4.754 |
| Biltrygging | SF528 | 31233712 | kr. | 5.629 |
| Biltrygging | BR871 | 31838959 | kr. | 4.726 |
| Biltrygging | SF898 | 31937736 | kr. | 2.957 |
| **Akfør til samans** | | | **kr.** | **64.721** |
| **Tryggingar til samans** | | | **kr.** | **706.514** |

# 10.0 Virksemi 2014

Niðanfyri er talva, ið vísir virksemi á Landssjúkrahúsinum árini 2012 til 2014. Hagtølini eru tikin úr talgildu heilsuskipanini vanliga nevnd THS.[1]

| Virksemishagtøl á Landssjúkrahúsinum 2012-2014 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Data | 2012 | 2013 | 2014 |
| Bráðdepil | Innleggingar | 290 | 263 | 259 |
| | Miðal innleggingartíð | 1,97 | 2,21 | 2,48 |
| | Ambulantar viðgerðir | 6.348 | 6.848 | 7.137 |
| | Seingjardagar | 571 | 581 | 643 |
| | Seingjarnýtsluprosent | 31,29 | 31,84 | 35,23 |
| Skurðdepil | Innleggingar | 3.470 | 3.441 | 3.621 |
| | Miðal innleggingartíð | 4,20 | 4,21 | 4,00 |
| | Skurðviðgerðir | 2.068 | 1.615 | 2.644 |
| | Dagskurðviðgerðir | 403 | 529 | 584 |
| | Ambulantar viðgerðir | 21.584 | 22.621 | 28.651 |
| | Seingardagar | 14.568 | 14.503 | 14.501 |
| | Seingjarnýtsluprosent | 65,43 | 65,14 | 65,13 |
| | føðingar | 596 | 608 | 623 |
| Medisinkurdepil | Innleggingar | 4.555 | 4.595 | 4.970 |
| | Miðal innleggingartíð | 4,19 | 3,91 | 3,77 |
| | Ambulantar viðgerðir | 23.990 | 28.541 | 27.811 |
| | Seingjardagar | 19.084 | 17.960 | 18.717 |
| | Seingjarnýtsluprosent | 85,71 | 80,66 | 84,06 |
| Psykiatriskurdepil | Innleggingar | 290 | 263 | 253 |
| | Miðal innleggingartíð | 31,51 | 29,19 | 43,41 |
| | Ambulantar viðgerðir | 10.135 | 9.715 | 10.007 |
| | Seingjardagar | 9.193 | 7.676 | 10.982 |
| | Seingjarnýtsluprosent | 62,97 | 52,58 | 75,22 |
| Samanlagt fyri Landssjúkrahúsið | Innleggingar | 8.605 | 8.562 | 9.103 |
| | Miðal innleggingartíð | 5,05 | 4,76 | 4,93 |
| | Ambulantar viðgerðir | 62.057 | 67.725 | 73.606 |
| | Seingjardagar | 43.416 | 40.720 | 44.843 |
| | Seingjarnýtsluprosent | 71,23 | 66,80 | 73,57 |

[1] Hagtølini skulu takast við fyrivarni. Arbeitt verður støðugt við at validera hagtalsskrásetingina í THS.

## 10.1 Starvsfólkayvirlit 2014

Niðanfyri eru talvur, ið vísa ávikavist starvsfólkayvirlitið fyri LS og Vaskaríið umframt ársverkini[2] á LS og Vaskarínum býtt á fakfeløg. Hagtølini eru tikin úr Lønardátuvøruhúsinum sum Gjaldstovan umsitur.

| Landssjúkrahúsið | | | |
|---|---|---|---|
| Starvsfólkayvirlit | Ár 2012 | Ár 2013 | Ár 2014 |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 40,00 | 38,50 | 40,40 |
| Onnur | 661,00 | 665,10 | 662,70 |
| **Fulltíðarstørv** | **701,00** | **703,60** | **703,00** |
| Vaskaríið | | | |
| Starvsfólkayvirlit | Ár 2012 | Ár 2013 | Ár 2014 |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 0,00 | 0,00 | 0,00 |
| Onnur | 16,0 | 18,4 | 18,90 |
| **Fulltíðarstørv** | **16,0** | **18,4** | **18,90** |
| **Fulltíðarstørv í alt** | **717,00** | **722,00** | **721,90** |

Ársverk býtt á fakfeløg.

| **Landsjúkrahúsið og Vaskaríið: Sáttmáli** | **Ársverk 2012** | **Ársverk 2013** | **Ársverk 2014** |
|---|---|---|---|
| Starvsmannafelagið | 101,1 | 102,02 | 101,34 |
| HAK - Havnar Arbeiðskvinnufelag, alment | 78,66 | 85,98 | 79,41 |
| Bioanalytikarafelagið | 25,11 | 26,48 | 24,46 |
| Ljósmøðrafelag Føroya | 16,28 | 16,34 | 17,48 |
| Tænastumannafelag/Tænastumannalíknandi | 2,07 | 2,14 | 2,12 |
| Serlæknafelag Føroya | 26,51 | 27,89 | 30,04 |
| Havnar Arbeiðsmannafelag - Portørar/ambulansustørv | 0 | 0 | 0 |
| Føroya Handverkarafelag | 2,02 | 1,6 | 0,98 |
| Hjálparlæknaráð Føroya | 38,58 | 40,1 | 39,61 |
| Akademikarafelag Føroya (AKF) | 10,2 | 9,63 | 10,37 |
| Dansk Tandlægeforening/KAF | 0 | 0 | 0 |
| Dansk Tandlægeforening/Landssjúkrahúsið | 0 | 0 | 0 |
| Starvsmannafelagið. Sjúkraflutningsstarvsfólk | 39,7 | 40,2 | 40,3 |
| Maskinmeistarafelag Føroya | 4,2 | 3,41 | 3,81 |
| Ymiskt | 0 | 0 | 0,03 |
| Føroyskir Ergo- og Fysioterapeutar | 13,25 | 16,21 | 17,4 |
| Kost- og Føðslufelagið | 12,56 | 13,6 | 13,66 |
| Føroya Pedagogfelag | 0,66 | 0,7 | 0,7 |
| Almanna- og Heilsurøktarafelagið og Føroya Psykiatrifelag | 61,48 | 57,88 | 56,81 |
| Havnar Arbeiðsmannafelag, privat | 4,82 | 6,52 | 7,81 |
| Lumma - og arbeiðspeningur | 0,73 | 1,02 | 1,09 |
| Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya | 4,49 | 4,44 | 3,81 |
| Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar | 272,88 | 265,38 | 269,48 |
| Heilsuhjálparafelag Føroya | 1,63 | 0,46 | 1,23 |
| **Til samans** | **716,93** | **722** | **721,94** |

[2] Tað eru fleiri uppgerðarháttir fyri ársverk. Verður støðið eitt nú tikið í tímatalinum úr Vaktplanskipanini, verður myndin av gongdini seinastu árini ein onnur.

# 11.0 Bygnaður Landssjúkrahúsið 2014

